# Í fínasta lagi at flyta størvini til Suðuroyar

**ALMENN STØRV** Løgmaður dugir ikki at síggja nakran sum helst trupulleika í, at barsilsskipanin verður flutt til Suðuroyar

Áki Bertholdsen

– Tað er í fínasta lagi at flyta barsilsskipanina til Suðuroyar.

Tað hevur elvt til øsing at umsitingin av barsilsskipanini nú skal flytast av ALS í Havn til TAKS í Suðuroy.

Men hesum sær løgmaður ongan trupulleika í.

Hann sigur, at talan er ikki um eina politiska flyting. Talan er heldur ikki um at flyta ein stovn.

– Hetta er tvørturímóti ein umsitingarlig flyting burtur av.

### Undir ein hatt

Hann vísir á, at sum støðan hevur verið higartil, hevur TAKS í Suðuroy umsitið innkrevjingina til Barsilsskipanina og ALS hevur umsitið útgjaldið.

Sostatt verður barsilsskipanin umsitin á tveimum støðum, har TAKS í Suðuroy frammanundan umsitur innkrevjingina og ALS umsitur útgjaldið.

– Landsstýrismaðurin í vinnumálum heldur, at tað er rættast at flyta alla umsitingina undir ein hatt, tí tað er skilabesta. Tí samdust landsstýrismaðurin í vinnumálum og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum um eisini at flyta útgjaldið úr barsilsskipanini undir TAKS.

– Hetta er ein logisk og væl grundað avgerð, eisini fyri at rationaliserað sum mest

– Men tað er stjórin í TAKS, sum hevur gjørt av at flyta útgjaldið úr barsilsskipanina til TAKS í Suðuroy, tí so er øll barsilsskipanin savnað á sama staði.

Hann sigur, at meiri liggur ikki í hesum.

– Eg havi biðið um eina frágreiðing frá landsstýrismanninum í vinnumálum og landstýrismanninum í fíggjarmálum um gongdina í hesum máli.

Kaj Leo Johannesen sigur, at hann hevur fingið frágreiðingina og hana hevur hann góðtikið.

Sostatt staðfestir hann, at hann nætlar ikki at gera meiri við málið.

– Tað er fyri at samskipa Barsilsskipanina, at innkrevjing og útgjald eru løgd saman.

Og tað kann altso heldur ikki vera forboðið at leggja nøkur almenn størv úti um landið, leggur hann afturat.

*aki@sosialurin.fo*

## Tað kann ikki verða forboðið at leggja almenn størv úti um landið

## Verða stovnar fluttir uttan politiska semju, fer tað at kosta landsstýrisfólkum høvdið

## Hetta er ein logisk og væl grundað avgerð



## Kostar høvdið

**Verða almennir stovnar fluttir, skal tað verða eftir eini politiskari semju.**

**Tað staðfestir Kaj Leo Johannesen, løgmaður.**

**Hann sigur, at hetta samdust samgongan um eftir at heilsutrygdin varð flutt til Klaksvíkar.**

**Hann staðfestir sostatt, at ger okkurt landsstýrisfólk av at flyta ein almennan stovn, uttan at politisk semja er um tað, fer tað at fáa avleiðingar fyri viðkomandi landsstýrisfólk.**

**Sostatt fer tað at kosta viðkomandi landsstýrisfólki høvdið.**

**Men sum tað sæst í øðrum greinum her á síðuni, metir hann ikki, at talan er um at flyta ein stovn, tá ið ein partur av Barsilsskipanini verður fluttur til Suðuroyar.**

### AVGJØRDUR

*Ongin fremstifingur á løgmanni á lofti hesuferð. Tað er logiskt og væl grundað at leggja alla barsilsskipanina undir ein hatt og tí geri eg onki við avgerðina um at flyta ein part av skipanini til Suðuroyar, sigur Kaj Leo Johannesen, løgmaður*

## Annika mótmælir til fánýtis

Løgmaður fer ikki at taka mótmæli frá Anniku Olsen til eftirtektar.

Tað staðfestir hann fyri Sosialinum.

Landsstýriskvinnan í innlendismálum er í øðini um ætlanina at flyta ein part av umsitingini av barsilsskipanini til TAKS í Suðuroy.

Hon staðfestir, at tá ið heilutrygd varð flutt til Suðuroyar, gjørdi løgmaður greitt, at hetta átti at verið viðgjørt í landsstýrinum, og at framyvir skuldi onki landsstýrisfólk flyta nakran stovn, uttan at hetta hevði verið fyri á landsstýrisfundi.

Hendan flytingin hevur ikki fingið nakra politiska viðgerð og er heldur ikki viðgjørt í landsstýrinum, sigur hon

Nú vónar hon, at løgmaður heldur orð, sum hon málber so, og gevur landsstýrismanninum við vinnumálum og í fíggjarmálum greið boð um at taka hesa flytanina aftur.

Men løgmaður sigur, at hann ger ikki meiri við flytingina og hann fer sostatt ikki at taka mótmæli frá landsstýriskvinnuni til eftirtektar.

– Men vil Annika Olsen hava málið til viðgerðar á landsstýrisfundi, er hon sjálvandi vælkomin til tað, sigur Kaj Leo Johannesen.

Hann vísir annars á, at málið hevur verið til umrøðu á landsstýrisfundi fyrr í ár.

## Hendan flytingin hevur ikki fingið nakra politiska viðgerð